## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Lot til andøvsgul av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og regn av og á. Út á seinnapartin hækkar hann upp í vestan ella útnyrðing og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur. Seinnapartin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og útnyrðingi og fríggjadagin yvirhøvur turt og sólglottar, men leygardagin ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Ein lítil jokari

**Yngsti tingmaðurin hjá javnaðarflokkinum hevur fingið sítt at hugsa um, nú húskið er økt við einum persóni**

**BARNSBURÐUR**
*Jákup Mørk*

Tá John Johannesen í februar mánað varð valdur á ting, var tað ikki bert hetta, sum hann fegnaðist um.

Um sama mundi kundi hann spakuliga byrja at fyrireika seg upp á leiklutin sum pápi.

Tann partin varð tó ikki so nógv tos um ta ferðina, men úrslitið av øllum kom til verðina leygarkvøldið kl. 21.56.

Hóast talan var um eina heldur buldraliga komu, har keisaraskurður at enda mátti til, so kom lítil Hans Oluf Ragnhildarson Johannesen til verðina í øllum góðum.

Enn er hann ikki doyptur, men navnið varð fastlagt, so skjótt tað stóð greitt, at talan varð um ein drong. Abbanum, Hans Olufi Johannesen, untist nevnliga ikki at síggja fyrsta abbabarnið koma til verðina, tá hann í mars mánaði í ár brádliga doyði, einans 50 ára gamal.



*Tey vóru bæði móð, men gleðin var tó sjónligt, tá John Johannesen og Ragnhild Olsen gjørdust foreldur leygarkvøldið*
*Mynd: Eirikur*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 16 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 27 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 16 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 12 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 975 hPa. yvir Føroyum fer eystureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani hvørvur eystureftir.




Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer eystureftir. Eitt lágtrýst við Capa Race – ex »IVAN« – fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/09 kl. 06[00]–20/09. 06[00]. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,8 mm – mált frá 19/09 kl. 06[00]–20/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 164,2 mm


RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 21. sep | 00.04 | 12.46 | 11.46 | — | — | 12.01 | 02.04 | 14.46 | 03.04 | 15.46 | 11.01 | 23.43 | 10.01 | 22.43 | 00.19 | 13.01 | 01.19 | 14.01 | — | 12.31 | 01.04 | 13.46 |
| 22. sep | 01.28 | 14.10 | 00.28 | 13.10 | 00.43 | 13.25 | 03.28 | 16.10 | 04.28 | 17.10 | — | 12.25 | 11.25 | — | 01.43 | 14.25 | 02.43 | 15.25 | 01.13 | 13.55 | 02.28 | 15.10 |
| 23. sep | 02.52 | 15.21 | 01.52 | 14.21 | 02.07 | 14.36 | 04.52 | 17.21 | 05.52 | 18.21 | 01.07 | 13.36 | 00.07 | 12.36 | 03.07 | 15.36 | 04.07 | 16.36 | 02.37 | 15.06 | 03.52 | 16.21 |
| 24. sep | 03.51 | 16.19 | 02.51 | 15.19 | 03.06 | 15.34 | 05.51 | 18.19 | 06.51 | 19.19 | 02.06 | 14.34 | 01.06 | 13.34 | 04.06 | 16.34 | 05.06 | 17.34 | 03.36 | 16.04 | 04.51 | 17.19 |

5 707265 100029 >